## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Um morgunin lot til andøvsgul av suðri, turt og sólglottar, men um middagsleitið regn. Seinnapartin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og regn ella mjørki. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Upp í stívt andøvsgul av útsynningi og mánadagin yvirhøvur turt, men týsdagin ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR



*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

### NAVN: HANS THOMASEN

**Hvat gert tú til dagliga?**
Eg eri sjálvstøðugur timburmaður. Beint nú arbeiði eg í Klaksvík og geri klárt til Summarfestivalin.

**Vart tú ólavsøku?**
Nei, eg var einki serligt úti. Eg lá inni við einari búkilsku, so tað var ikki tað besta. Annars haldi eg, at eg eri vorðin ov gamal til slíkt. Hehe.

**Fert tú á Summarfestival?**
Ja, tað ætli eg mær. Eg havi verið fyrr, og tá dámdi mær stak væl. Nøvnini í ár síggja spennandi út. Serliga gleði eg meg til at hoyra Shubidua.

**Hvør festivalur er tann besti?**
Tað kann eg ikki ordiliga siga, tí at G! Festivalurin og Summarfestivalurin eru púra hvør sítt. Eg var á G!, og tað er kanska meira alternativt, meðan Summarfestivalurin hevur breiðari tónleik. Men G! Festivalurin hevur betri umhvørvi. Tað er flott at hava ein festival á einari strond.

**Fylgir tú við í føroyskum fótbólti?**
Ja, eg haldi við HB. Kappingarárið hjá teimum hevur verið fínasta salg. Teir liggja kanska ikki so ovarlaga sum okkurt annað árið, men vónirnar vóru ikki so høgar til teir í ár. Liðið er so ungt, so eg haldi, at úrslitini hava verið á einari leið.

**Hørjum vilt tú heilsa?**
Øllum mínum vinum og serliga damuni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 31 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 37 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 13 |
| New York | 36 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1022 hPa. vestan fyri Írland og ein hátrýstryggur til Íslands fara eystureftir. Eitt lágtrýst, 1005 hPa. í útsynning úr Íslandi fer mót Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar um vikuskifti.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/8 kl. 06[00]– 2/8. 06[00]. Hitin í gjár: 11,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,2° - Mesti hiti máldur í juli: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0 mm – mált frá 1/7 kl. 06[00]– 2/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 0,1 mm




Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

29. juli Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. Aug | 01.43 | 14.18 | 00.43 | 13.18 | 00.58 | 13.33 | 03.43 | 16.18 | 04.43 | 17.18 | - | 12.33 | 11.33 | - | 01.58 | 14.33 | 02.58 | 15.33 | 01.28 | 14.03 | 02.43 | 15.18 |
| 4. Aug | 02.54 | 15.18 | 01.54 | 14.18 | 02.09 | 14.33 | 04.54 | 17.18 | 05.54 | 18.18 | 01.09 | 13.33 | 00.09 | 12.33 | 03.09 | 15.33 | 04.09 | 16.33 | 02.39 | 15.03 | 03.54 | 16.18 |
| 5. Aug | 03.42 | 16.09 | 02.42 | 15.09 | 02.57 | 15.24 | 05.42 | 18.09 | 06.42 | 19.09 | 01.57 | 14.24 | 00.57 | 13.24 | 03.57 | 16.24 | 04.57 | 17.24 | 03.27 | 15.54 | 04.42 | 17.09 |
| 6. Aug | 04.37 | 17.04 | 03.37 | 16.04 | 03.52 | 16.19 | 06.37 | 19.04 | 07.37 | 20.04 | 02.52 | 15.19 | 01.52 | 14.19 | 04.52 | 17.19 | 05.52 | 18.19 | 04.22 | 16.49 | 05.37 | 18.04 |
| 7. Aug | 05.32 | 17.56 | 04.32 | 16.56 | 04.47 | 17.11 | 07.32 | 19.56 | 08.32 | 20.56 | 03.47 | 16.11 | 02.47 | 15.11 | 05.47 | 18.11 | 06.47 | 19.11 | 05.17 | 17.41 | 06.32 | 18.56 |

5 707265 100050 >